## Sigldu ávirkaðir

Løgreglan í Ringkøbing í Danmark hevur gjørt av at skuldseta tveir menn fyri at hava siglt við báti, meðan teir vóru ávirkaðir av rúsdrekka. Menninir, sum eru brøður, sendu neyðarkall sunnudagin, tí teir høvdu siglt á land í einari vík nærhendis Ringkøbing. Teir boðaðu frá, at sjógvur var í bátinum, og at hann var um at søkka. Teir fingu kortini bátin avaftur, men tá teir komu til lands, blivu teir tiknir og skuldsettir fyri rúsdrekkasigling.

## Ikki í stjórn

Í Íslandi er líkt til, at Framsóknarflokkurin fær ein frammaná, nú val verður til Altingið um vikuskiftið. Tann seinasta meiningakanningin vísir, at flokkurin fær 7,6 prosent av atkvøðunum og missir sjey av sínum tólv tingmonnum. Flokkurin er í verandi stjórn, men Valgerður Sverrisdóttir, uttanríkisráðharri og úr Framsóknarflokkinum, sigur, at flokkurin fer ikki í stjórn aftan á valið, um valúrslitið verður so ringt, sum kanningin vísir.

Sirri í Vági:

# Virka 40 tons av ull í ár

**Klædnafyritøkan væntar at virka 60 tons komandi ár. Spurningurin er bert, um tey fáa hendur á ullini**

FRAMLEIÐSLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Árni Brattaberg læt væl at søluni á NAFF. Hinvegin harmast hann um, at so nógv av føroysku ullini ikki kemur til høldar.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ein av teimum, ið sýndu fram á North Atlantic Fish Fair, var klædnafyritøkan Sirri í Vági. Árni Brattaberg eigur fyritøkuna, og hann var sjálvur við á stevnuni.

Og hann læt væl at søluni hesar dagarnar, stevnan vardi.

Alt verður virkað úr føroyskari ull og fer gjøgnum eina lutfalsliga langa tilgongd, áðrenn lidna vøran kemur út til kundan. Heilt frá vasking um tøting og spinning til binding og veving.

Ullin er sum nevnt tilfeingið, og á tí økinum áttu vit at verið væl fyri, tá hugsað verður um, at Føroyar bera 70.000 áseyðir. Men so er kortini ikki, sambært Árna Brattaberg, stjóra í Sirri.

- Tað vísir seg, at alt ov lítið av ullini kemur til høldar. Vit koma at brúka 40 tons í ár, og ætlandi fara vit at brúka 60 tons komandi ár. Spurningurin er bara, um vit fáa hendur á so nógvari ull, sigur Árni Brattaberg.

### Nógv fyri skeyti

Spurningurin er so, hví menn ikki fáa ullina til høldar. Ein sannroynd er, at í nógvum hagapørtum verður ullin bara brend, aðrastaðni endar hon í ruskbingjunum kring landið. Og tað er harmiligt, tí hetta er tilfeingi, sum nógv kundi verið gjørt burturúr, heldur Árni Brattaberg.

- Tað er heldur ikki so, at fólk gera tað púra fyri einki. Vit lata 10 kr. Fyri kilo av ull, og hartil verður latið fýra krónur í stuðli. Heldur ikki skal nakað gjaldast fyri flutning, so tað átti at lønt seg hjá onkrum at savna ullina saman, sigur stjórin á Sirri.

Hann sigur, at í summum førum hevur hann sett seg í samband við fólk og beinleiðis gjørt avtalur við tey um at fáa ullina til høldar. Tað hevur víst seg at givið frægasta úrslitið.

- Serliga hava konufólk verið røsk at savna ullina og fingið hana til Vágs. Og sum nevnt er eitt ikki so lítið oyra til tann, ið tímir at fáast við tað, sigur Árni Brattaberg.

Tað er annars postverkið, ið skipar fyri flutninginum í serligum sekkum.

Tryggingarfelagið Føroyar skipar fyri:

# Fíggjarligir tungvektarar greiða frá privatisering

**Tveir tungvektarar innan norska fíggjarheimin koma til Føroya í dag at greiða frá teirra royndum av privatiseringum í Noregi. Tryggingarfelagið Føroyar skipar fyri fyrilestrum um evnið morgin**

FYRILESTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tveir av fremstu stjórunum innan norska fíggjarheimin koma nú til Føroya at siga sína hugsan um privatisering sum heild – men eisini við atliti til komandi privatiseringina av Føroya Banka.

Talan er um Øyvind Birkeland, ið er stjóri fyri DnB NOR Kapitalforvaltning, sum er størsti bankin í Noregi. Bankin umsitur 1.700 milliardir norskar krónur og hevur 2,2 milliónir privatkundar og 188.000 vinnulívskundar. Fyritøkan hevur áleið 12.000 starvsfólk, og er samstundis størsta lívs- og pensjónstryggingarfelag í Noregi við umleið 900.000 kundum.

Hin fyrilestrarhaldarin er Helge Leiro Baastad, og er forstjóri í Gjensidige, eitt av størstu skaðatryggingarfeløgunum í Noregi við umleið einari millión kundum og tryggingargjøldum upp á 14 milliardir norskar krónur. Eini 3000 fólk starvast hjá Gjensidige, sum eisini hevur uppkeypt tryggingarfeløg í fleiri øðrum londum, eitt nú í Danmark og baltikum.

- Tað er eyðsæð, at hesir báðir hava nógvar og drúgvar royndir innan fíggjarheimin, og hava verið við til samanleggingar og privatiseringar av almennum fyritøkum, sigur Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.

### Hvat við Føroya Banka

Ein av heilt spennandi hendingunum innan føroyska fíggjarheimin í hesum døgum, er privatiseriingin av parti av Føroya Banka. Og sjálvandi verður hetta eisini eitt tema í sambandi við fyrilestrarnar og kjakið í morgin.

- Hetta eru mennn, sum hava drúgvar royndir at arbeiða í einari børsskrásettari fyritøku, og vita alt um, hvørjir fyrimuni og hvørjir vansar fylgja við tí, sigur Gunnar í Liða.

Í tí sambandi nevnir forstjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar, at børsskráseting er fyri eina fyritøku ein kelda til kapital, dynamikk og opinleika, men samstundis verður fyritøkan sárbær og í vanda fyri at verða uppkeypt av øðrum stórfyritøkum.

- Føroyskt vinnulív stendur á gáttini til stórar avbjóðingar. Evnisdagurin bjóðar eitt sjáldsamt innlit, sum kann gagna øllum teimum, sum ikki ræðast nýggju avbjóðingarnar, sigur Gunnar í Liða.

Byrjað verður kl. 16.00 í morgin í Klingruni í Norðurlandahúsinum og hildið fram til áleið 17.30. Øll eru vælkomin, men plássið er avmarkað, so tað er at boða frá luttøku í góðari tíð.



*Gunnar í Liða, forstjórií Tryggingarfelagnum Føroyar*
*Savnsmynd*